ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*– Eg havi ikki so stóran áhuga fyri politikki longur, og eg vænti ikki, at eg stilli upp, men eg veit ikki*
*(Al Gore)*

# Var fangi í átta ár



*Jhon Piancho Blanco vísir ketuna, sum hann sat leinkjaður við í fangaleguni.*

**Fyri átta árum síðani varð løgreglumaðurin Piancho Blanco burturfluttur í Kolombia. Nú er hann komin afturíaftur**

Í 17 dagar kreyp hann ígjøgnum Amazonas-frumskógin, til hann mikudagin kom fram á eina deild hjá kolombiskurúsevnaløgregluni.

Jhon Piancho Blanco bleiv burturfluttur fyri átta árum síðani, og tann vinstrasinnaða uppreistrarrørslan FARC leyp á býin Mitu. 53 fólk doyðu í álopinum, og 61 vórðu burturflutt. Sjey av teimum 61 eru framvegis ikki latin leys.

Jhon Piancho Blanco sigur við CNN, at hann sat fangi saman við tveimum amerikanarum, sum vórðu burturfluttir í 2003, tá flogfar teirra mátti neyðlenda í kolombiska frumskóginum. Hann sigur eisini, at millum fangarnar var politikarin Ingrid Betancourt, sum hvarv í 2002, og sum eingin hevur hoyrt nakað frá síðani. Fyrr enn nú.

Kolombisku myndugleikarnir siga, at FARC burturflytur umleið 60 fólk á hvørjum ári, og at tey burturfluttu vanliga verða latin leys í býti við FARC-limir, sum sita í fongsli.

## Blair iðrar seg ikki

Tony Blair, sum fer frá sum bretskur forsætisráðharri í næsta mánað, var í gjár í Washington og segði vinmanninum George W. Bush, forseta farvæl. Í Bretlandi hevur Blair verið fyri hvøssum atfinningum, tí hann valdi at stuðla Bush í krígnum við Irak, men á tíðindafundi í gjár segði hann, at hann iðraði seg ikki um ta avgerðina.

- Bretland fer altíð at vera ein álítandi og trúgvur stuðul í bardaganum ímóti yvirgangi, segði fráfarandi forsætisráðharrin.

# Gore sigur ikki nei

**Fyrrverandi varaforsetin vil ikki siga, um hann ætlar sær at verða forseti**

Tær seinastu vikurnar hava amerikanskir fjølmiðlar fleiri ferðir nevnt, at fyrrverandi varaforsetin Al Gore ætlar at royna at gerast valevni hjá demokratunum til forsetavalið næsta ár.

Men høvuðspersónurin sjálvur sigur seg hava lítlan hug at royna. Við vikublaðið Time sigur Al Gore, at hann hevur ikki so stóran áhuga fyri politikki longur. Men Time heftir seg við, at hann sigur ikki, at hann ikki fer at stilla upp, og tað ger hann heldur ikki nú.

– Eg havi ikki víst tankanum frá mær, men eg vænti ikki, at eg fari at royna, sigur hann við blaðið.

Annars heldur Al Gore, at hann hevur eina týdningarmikla uppgávu sum talsmaður fyri tiltøkum, sum skulu tálma veðurlagsbroytingunum.



*Al Gore veit framvegis ikki, um hann fer at stilla upp næsta ár*

## STUTT SAGT

### Svølta seg

Tólv menn, sum eru ákærdir fyri yvirgangsvirksemi í Spania, eru farnir at svølta seg í fongslinum. Menninir eru ákærdir fyri at hava verið uppi í atsóknini at fýra tokum í Madrid í 2004. Teir tólv siga seg vera ósekar, og umvegis verjan hava teir sagt, at teir verða brúktir sum finnur í einum politiskum talvi. Sponsku myndugleikarnir siga, at tað fær onga ávirkan á málið, at teir tólv svølta seg, og ein dómari í Madrid gav í gjár fongsulsverkinum heimild til at tvangsfóðra fangarnar, vilja teir ikki eta sjálvir.

### Kendur fangi tikin

Týskarin Khaled El-Masri, sum gjørdist kendur um allan heimin í 2004, tá amerikanska fregnartænastan CIA burturflutti hann til Afghanistan og seinni til Guantanamo, varð tikin í gjár og skuldsettur fyri at hava sett eld á eina byggibúð í býnum Neu-Ulm í Suðurtýsklandi. Verji hansara sigur, at El-Masri hevur sálarligar trupulleikar, men at hann ikki fær ta neyðugu hjálpina. Sambært verjanum setti El-Masri eld á byggibúðina, so hann kundi blíva tikin og fáa neyðuga viðgerð. Hann hevur eisini rokkið málinum fyribils í hvussu er, tí í gjár bleiv hann lagdur inn á eitt sinnissjúkrahús, skrivar DPA.

### Blíva ríkisborgarar

12 milliónir fólk, sum eru í USA, men sum eru komin hagar á ólógligan hátt, fáa kanska amerikanskan ríkisborgararætt um stutta tíð. Demokratiskir og republikanskir senatorar samdust í gjár um at orða eitt lógaruppskot, sum skal gera teir ólógligu innflytararnar lógligar. Samstundis skulu tey fremmandu, sum ikki ætla sær at verða verandi í USA, fáa uppihalds- og arbeiðsloyvi. Ætlanin er, at Kongressin skal samtykkja uppskotið í hesum árinum.